# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fimm ættarlið



*Sitandi: olduromman Thomasia Matras. Standandi frá vinstru eru: omman Gunnvá Akraberg Hansen, Langabbin Marni Ørvarodd, Mamman Birgit Akraberg Hansen, og Lítlið Gunnar*

## Dagurin

**28. oktober.** Tveggja ápostla messa, Símun Selotes og Judas Taddeus. Søgnin sigur, at teir vórðu báðir dripnir í Persiu í árinum 71. Á einum av kirkjubøstólunum sæst mynd av einum ápostli við gassa í hendi. Er helst annar av teimum, tí søgnin sigur, at teir báðir vórðu bardir til deyða.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Merkisdagar

**Prógv**
Fríggjadagin 23. okt. hevur Jóhan Símun Joensen, Fuglafjørður, fingið prógv sum Master of Arts í Political Science (Stjørnmálafrøði) á universitetinum í St. John's, Newfoundland, Canada, Memorial University of Newfoundland.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. nov. verður Elsa Egilsnes, Vestmanna, 70 ár. Dagurin verður hildin á Fjørukrønni frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 29. okt. fyllir Jensia Svabo Thomasen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin heima, Giljavegur 62, frá kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Annvør Fredriksen**, Rødovre, fødd Lassaberg, av Viðareiði, andaðist í heiminum 26 okt. 66 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13, úr Hendriksholmskirke, Rødovre.

**Ragnhild Fuglø**, ættað úr Hvalba, búsitandi í Havn, andaðist mánadagin á Ellisheiminum, 88 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Ragnhild, kunnu lata Vitninum í Hvalba eina gávu, konto í Eik banka.

**Fía Toftegaard** í Fuglafirði andaðist á landssjúkrahúsinum mánadagin, 89 ára gomul.

**Eskild Højgaard**, Toftir, andaðist á Eysuroyar Røktar- og Ellisheimi mánadagin, 79 ára gamal.

**Ása Udbø** úr Havn, búsitandi í Hirtshals, andaðist á Hospice Vendsyssel í Frederikshavn, sunnudagin 25 oktober, 60 ára gomul.

**Einar Petersen**, vanliga nevndur Einar Suðring, andaðist á Ellisheiminum í Runavík sunnudagin, 98 ára gamal.

# Tøkk



**Kirstin Vestergaard**
( fødd á Heygum) 17. 01. 31
og andaðist 5. oktober 2009

Í samband við at okkara kæra mamma, kona, omma og vermamma andaðist 5. okt. og fór til jarðar úr Tvøroyrar kirkju 7. oktober, vilja takka øllum tykkum sum hava stuðlað og hjálpt okkum, t.d. starvsfólkini á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Landssjúkrahúsinum, Ríkissjúkrahúsinum og Hvidovre Hospital. Heimasjúkrasystrunum á Tvøroyri og í Tórshavn. Starvsfólkini á Sjúklingahotellinum Hotel Tórshavn í Keypmannahavn og Hvíldarheiminum Naina. Øllum tykkum, sum vitjaðu á sjúkrahúsinum í Føroyum og aðrastaðni. Teimum, sum ringdu, teimum, sum troystaðu, teimum, sum fylgdu til jarðarferðina og teimum, sum hjálptu til við at baka o.l., teimum, sum sendu heilsanir við gávum til Sjúklingahotellið Hotel Tórshavn og tykkum, sum sendu kransar og blómur til jarðarferðina ella heim til familjuna. Tøkk til prest, dekn og organist í Tvøroyrar kirkju, sangarar og øll onnur, sum hjálptu til.
Takk fyri øll somul.

*Heilsan*
**Torkil Vestergard og børnini**
**Birtha, Hjalgrím, Guðrið og Fróði**